AFS:

# Latið dyrnar upp fyri verðini



*Holly er ein av AFS´arunum í Føroyum í ár. Hon býr í Fuglafirði og gongur í skúla á Kambsdali. Í ár hava tvær gentur, ein týsk og ein brasiliansk, valt at sleppa til Føroya, men hetta er ikki altíð so lætt, tí ov fáar vertsfamiljur melda seg*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**AFS er ein altjóða felagsskapur, sum sendir ungdómar út í heimin í eitt tíðarskeið, har teir búgva hjá eini familju og uppliva landið á ein sindur øðrvísi hátt enn vanligt. Endamálið er at seta seg inn í eina aðra mentan og at læra eitt nýtt mál**

AFS
*Ingrid Bjarnastein*

Í AFS høpi eru Føroyar undir Danmark. Hetta vil siga, at um ein japanari hevur hug at fara til Danmarkar við AFS, so kann tað koma fyri, at hann verður sendur til Føroya ístaðin fyri. Men sum nakað heilt serligt, so ynskja tvær gentur næsta ár, at koma til Føroya. Hetta er ikki vanligt, og tí ynskir AFS veruliga at kunna bjóða teimum eitt ógloymandi uppihald, men ber hetta illa til, um ongar vertsfamiljur bjóða seg fram.

– Endamálið við at taka ein slíkan næming inn er, at tey skulu liva seg inn í samfelagið og familjuna, sigur Elisabeth Holm, formaður fyri AFS í Føroyum.

– Nógvar familjur halda, at tað er ógvuliga bindandi at fáa ein slíkan ungdóm í húsið, men soleiðis skal tað ikki uppfatast. Í veruleikanum, so er tað, ið krevst av familjuni, ikki stórt meira, enn at hon er opin og positiv, og hevur áhuga í hesum næminginum.

Eisini rokna fólk ofta við, at hesin næmingurin verður ein stór útreiðsla fyri familjuna, men so er als ikki. Tað er sum at fáa ein eyka til døgurðaborðið. Lummapeningi og annað skipar næmingurin sjálvur fyri.

## Seta krøv

– Vertsfamiljan skal heldur ikki vera bangin fyri at seta krøv til næmingin. Ein skal royna at fáa næmingin so væl inn í familjuna sum gjørligt, og tí eigur hann eisini at taka eina hond við í tí dagliga. Ongin fer út fyri at fáa tað sama, sum tey fáa heima, og tí skal ein ikki himprast við at biðja næmingin hjálpa til, sjálvt um hann kanska heima er vanur við hjálparfólk og stórar og fínar bilar, greiðir Elisabeth frá.

Elisabeth Holm leggur dent á, at teir fysisku karmarnir eru als ikki tað týdningarmesta. Tað er ikki sagt, at næmingurin skal hava eitt kamar fyri seg sjálvan.

– Týdningarmest er, at familjan er opin fyri at lata sítt heim upp fyri einum fremmandum, deila við viðkomandi og verða góður við hann. Hetta telur nógv meira enn at næmingurin fær egið kamar, egna inngongd og annað, sum so at siga als ikki er neyðugt.

Krøvini til familjuna eru ikki serliga stór. Tó skal hon vera rímiliga opin, flexibul og tolin. Áhugin hevur eisini nógv at siga. Áhugi er týdningarmikil, og eisini tað, at viðkomandi verður tikin inn í familjuna, sum ein familjulimur.

– Hetta merkir tó ikki, at næmingurin skal undirhaldast 24 tímar um døgnið. Næmingurin eigur sjálvur at finna sítt egna undirhald. Hetta verið seg vinir, ítróttur, skótar, kór ella annað, ið hevur hansara áhuga, sigur Elisabeth Holm.

## Ikki bara Havn

AFS ynskir ikki bara familjur í Havn. Tey, sum búgva á smáplássum í Føroyum, eru meira enn vælkomin at gerast vertsfamiljur.

– Tá AFS´arar eru á smápláss, so hava teir ofta lættari við at integrera seg í nærumhvørvið. Ikki er neyðugt, at senda næmingin á studentaskúla, tí um meldað verður út nóg tíðliga, og næmingurin hevur hóskandi aldur, so kann hann eisini ganga á framhaldsskúla, sum hoyrir til kommununa. Á smáplássum kenna øll hvønn annan, og er hetta avgjørt ein fyrimunur, greiðir Elisabeth Holm frá.

At fáa ein fremmandan í húsi á henda hátt leggur upp til spennandi samtalur, har unglingurin hevur nakað at geva aftur. Tað verið seg, at hann veit jú nógv at fortelja um heimland sítt, og so er hann forvitin at vita so nógv um Føroyar sum til ber.

Sum familja lærir man meira um seg sjálvan. Hvussu tað ymsu støðurnar skulu takklast, og sjónarringurin víðkast.

– Nú skal man heldur ikki halda, at tá man hevur fingið ein næming í húsið, at familjan síðani verður slept á fjall hesum viðvíkjandi. Nei, hvør næmingur hevur egnan kontaktpersón, sum hann kann ráðgeva seg við, og sum familjan kann venda sær til. Harafturat stendur AFS altíð til ráðs um tað er nakað ein ivast í. Í ringasta føri, um tingini als ikki ganga, so skal ein gera vart við tað, tí so verður næmingurin fluttur, sigur Elisabeth.

Tað eigur tó at verða væl umhugsað áðrenn dyrnar verða latnar upp á henda hátt. Men tá tað verður gjørt, verður hetta ein rík uppliving fyri lívið.

# Ferðsluóhapp við Breiðará

**Um 19 tíðina sunnukvøldið var eitt ferðsluóhapp á Kambsdali, har ein 19 ára gamal drongur og ein 15 ára gomul genta vóru við**

ÓHAPP
*Ingrid Bjarnastein*

Veðrið var gott og vegurin er góður at koyra á, og tí veit løgreglan í Runavík ikki at siga, hvør orsøkin var til óhappið.

Tað var um 19 tíðina sunnukvøldið, at politistøðin í Runavík fekk fráboðan um eitt ferðsluóhapp beint sunnanfyri Fuglafjørð - við Breiðará.

Ein 19 ára gamal drongur og ein 15 ára gomul genta vóru við, og hevði drongurin fingið rættiliga stóran skaða. Gentan var ikki eins illa stødd og drongurin, men tey vórðu bæði flutt á Landssjúkrahúsið.

Annars verður sagt av politistøðini í Runavík, at ógvuliga friðarligt hevur verið um vikuskiftið. Dansur var á Kambsdali, men tað hevur ikki merkt løgregluna. Sum heild kring landið lata politistøðirnar stak væl at, so ein kann siga, at fólk hava skikkað sær heilt væl um vikuskiftið.

# 11 inn at sova

**Í Havn hevur verið rímiliga friðarligt um vikuskiftið, verður sagt av politistøðini. Tó hava heili 11 fólk verið í kjallaranum, sum teir kalla tað, og sovið rúsin av**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

– At fáa 11 fólk inn á støðina at sova, er rættiliga nógv, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn. – Tað er í øllum førum meira enn vanligt. Tey, ið komu inn at gista, vórðu tikin síðani seinnapartin fríggjadagin, og tey flestu fyri fyllskap.

Annars hevur verið rættiliga friðarligt. Eitt sindur av herverki her og har, onkrir brotnir rútar, og eisini hevur onkur brotið bakrútin á einum politibili. Hetta hendi náttina til sunnudagin í miðbýnum.

Í Klaksvík og í Vágunum hevur annars verið stak friðarligt. Politistøðin í Klaksvík hevði havt ein yvirnáttandi gest, og tað var ein hundur.

– Tá hundar ganga og mala leysir í býnum, so taka vit teir inn, sigur vakthavandi í Klaksvík. – Men vit fingu ongar uppringingar um vikuskiftið, so ein kann róliga siga, at tað hevur verið ógvuliga friðarligt.



Noel og Anja:

# Vit verða sæð sum eitt

**Tey komu og nú eru tey farin. Noel og Anja, sum vóru við í Baren á TV3, vitjaðu í Føroyum um vikuskiftið. Tey hava m.a. verið við til at lata nýggja Teledepilin hjá Føroya Tele upp, og so hava tey eisini verið at sæð í Platform**

VITJAN
*Ingrid Bjarnastein*

Tey síggja ógvuliga forelskað út. Klemmast, mussast og nálgast alla tíðina. Noel og Anja vitjaðu í Føroyum um vikuskiftið har tey hava verið við til ymisk tiltøk her í høvuðsstaðnum. Sosialurin var og fekk eitt prát við tey bæði seinnapartin fríggjadagin, stutt eftir at tey vóru komin til Føroya.

– Føroyar eru eitt fantastiskt land, sigur Noel, sum er tann, ið tosar mest. Anja heldur seg meira í bakgrundini, men viðhvørt kemur hon við onkrum viðmerkingum.

– Omma mín hevur verið her uppi, og hon hevði tikið uppá video, og tað sum vit hava sæð higartil er heilt ótrúligt.

Noel vann í Baren 2002 og hetta hevði við sær, at hann varð hálvmillióningur. Tá hann vann segði hann, at ætlanin var at fara at ferðast, og hetta er eitt lítið stig á leiðini.

– Grundin til, at vit eru her er alt hansara, sigur Anja flennandi, og peikar á Martin Brodersen frá Føroya Tele, sum hevur fingið tað í lag, at tey bæði koma til Føroya.

– Ja, leggur Noel afturat, – Vit søgdu ja, tí hetta er ein givin møguleiki. Tá tú skalt út á ferðast, so eru Føroyar so heilt vist ikki tað fyrsta tú hugsar um, men nú vit fingu møguleikan valdu vit at taka av. Hevði tað ikki verið fyri sendingini, so høvdu vit helst ongantíð komið til Føroya.

## Fólk hyggja

At vera við í Baren 2002 hevur bæði havt negativar og positivar fylgjur. Noel greiðir soleiðis frá:

– Fyri tað fysta, so fekk eg eina deiliga gentu og fyri tað næsta meira pengar. Men tað er so tað positiva Tá tú gongur á gøtunum í Keypmannahavn, so kennir tú á tær, at fólk hyggja eitt sindur meira enn vanligt, og eygnabráini hvíla á tær eina løtu. Tað verður sett nógv meira fokus á teg, sum einstaklingur enn áðrenn, og tað kennist eitt sindur løgið í fyrstuni. Og harafturat so er tað ein rúgva av telefonballadu, sum kann vera ógvuliga keðiligt.

Framtíðin hjá Noel Johansen er greið. Fyrst skal hann gera útbúgvingina hjá sær lidna. Hann lesur løgfrøði í Keypmannahavn, og í juni eru próvtøkur og síðani skal hann skriva spesiali. Væntandi verður hann liðugur í heyst.

– Nú havi eg lisið í seks ár, so nú vil eg hava útbúgvingina lidna, sigur Noel. – Síðani skulu vit standa á skíð í fýra mánaðar í Frankaríki. Ætlanin er eisini at fara eina tokferð í gjøgnum Evropa, til Italia og aðrastaðni. Eg las í London í fjør, og har kom eg at kenna eina rúgvu av fólki runt í Evropa. Men hetta verður so ikki fyrr enn HM í fótbólti hevur verið, sigur Noel flennandi.

Ætlanin var at fara at ferðast beint aftaná at Baren var liðug, men av tí, at Anja misti plássið har hon býr, valdu tey at bíða eina tíð.

## Fjølmiðlarnir liggja stillir

Noel og Anja verða av donskum fjølmiðlum rópt fyri "tv-kærester". Longu her er fingurin settur á, hvat fyri slag av forholdi fólk vænta tey hava. Men Noel sigur, at hetta er djúpari enn so.



*Eitt tað kendasta sjónvarpsparið í Danmark, Noel og Anja*

*Mynd: Finnur Justinussen*

– Tað var ógvuliga ringt tá vit vóru inni í Baren. Vit høvdu allatíðina mikrofonir á, so vit kundu ikki fortelja, hvørjum øðrum okkara innastu loynidómar. Ikki fyrr enn aftaná, hava vit lært hvønn annan rættiliga at kenna, og tað hevur verið heilt fantastiskt. Men fólk síggja okkum sum ein persón. Vit eru altíð Noel og Anja. Tey duga ikki at síggja ein uttan hin, tí so spyrja tey altíð eftir hinum, sum ikki er har, greiðir Noel frá.

– Síðani eg eri komin útaftur hevur tað verið ringt at venja seg við, at vera ein kendur persónur. Men av tí TV3 nú hevur sett nógv fokus á Robinson 2002, so fer nógv meira uppmerksomheit til tað enn á okkum, sum vóru við. Harafturat, so var Baren 2002 ikki nøkur brakandi succes, tá tað kemur til hyggjarar, men eg havi havt nøkur løgin upplivilsir, sigur Noel og greiðir víðari frá:

– Stutt eftir, at eg var komin út aftur, so gekk eg í Keypmannahavn við vinunum hjá mær. Brádliga flokkaðist ein skúlaflokkur uppá eini 20 børn rundan um meg, har eg ikki visti míni livandi ráð. Hetta er óskyldugt, men ringt at venja seg við. Tey hildu í øllum førum tað var ógvuliga stuttligt, men tað endaði við, at eg noyddist at biðja vinirnar hjá mær fara ein veg, og eg ein annan. Hetta er eitt sindur løgið, at tú soleiðis verður umringaður, tá tú mestsum gongur í tínum egnum tankum, men í síðsta enda er hetta bara nakað tú skalt venja teg við. Vit eru nú heldur ikki so ræðuliga kend. Vit hava ikki úrættað nakað serligt.

Sum heild liggja donsku fjølmiðlarnir rættiliga stillir, hvat vinnaranum av Baren 2002 viðvíkur. Nakrar samrøður hava verið gjørdar, men tí Robinson 2002 fyllir so nógv, so eru nakrar sendingar meira ella minni valdar frá.

– Hetta er á einum støði, har eg framvegis kann vera við og halda tað vera stuttligt, sigur Noel. – Tíbetur hevur tað ikki verið stressandi.

## Vinirnir flenna

Tá Noel fortaldi fyri vinunum, at hann fór at vera við í Baren 2002, flentu teir eftir honum. Stóribeiggi hansara, Thomas, gjørdi ikki mætari enn at siga, at nú var Noel vorðin til tað, hann altíð hevði vanvirt.

– Men sum sendingarnar gingu, og tað gekk væl hjá mær, so havi eg fingið positivt feedback frá vinunum hjá mær. Teir halda, tað er stuttligt at hoyra um, og teir vísa áhuga í tí, eg havi gjørt, sigur Noel.

– Og nú tá eg vann, kann ein siga, at eg havi gjørt teirra vanvirðing til skomm.

Men danska sjónvarpsparið hevur eina fulla skrá, so tá eitt lítið korter var farið, var tíðin komin at taka nakrar myndir, og síðani lata tey fáa frið. Tey vóru annars í Platform fríggjakvøldið, og leygardagin lótu tey nýggja Teledepilin upp, har tey skrivaðu autografar fyri eini rúgvu av fólki. Síðani vóru tey aftur í Platform leygarkvøldið, har vinnarin av Baren 2001, Erkan, eisini var við.

# Ótangar í bátahyli

**Leygarnáttina hava ótangar havt fragd av at gjørt seg inn á bát í bátahylinum í Vági**

HERVERK
*Dagfinn Olsen*

Tað var ein ógvuslig sjón, ið møtti fólki, ið kom í bátahylin í Vági leygarmorgunin. Um náttina hava ótangar havt fragd av at gera seg inn á stuttleikabát.

Ótangarnir hava kett seg og hava stytt sær stundir við at blaka hegnpelar í bátin, so rútarnir fóru í knús. Tá fólk kom á staðið á morgni, var nærum ikki heilur rútur eftir og hegnpelarnir stóðu í allar ættir úr brotnu rútunum.

Hegnpelarnar høvdu ótangarnir tikið frá timburhandlinum, ið heldur til á økinum. Hvør tað er, ið hevur framt herverkið, er ikki greitt.



*Leygarnáttina hava ótangar havt fragd av at gjørt seg inn á bát í bátahylinum í Vági*